# hægri enn religión





*Seinnapartin var Naser Khader á vitjan í Løgtingshúsinum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Starvsfelagin í Fólkatinginum, Høgni Hoydal, var eisini komin at heilsa upp á Naser Khader, tá løgtingsformaðurin, Edmund Joensen, vísti honum Løgtingshúsið*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Millum tvær kvinnumentanir

Kona Naser Khader, Bente Dalsbæk, heldur fyrilestur í Miðlahúsinum klokkan 15 Skírisdag 5. apríl undir heitinum »Millum tvær kvinnumentanir«. Um tað verður borðreitt kaffi við undirskál, er hetta eitt tekin um viðurkenning, er bara eitt av mongum, sum Bente Dalsbæk lærdi, tá hon forelskaði seg í einum manni við arabiskari bakgrund og harvið fekk eina muslimska vermóðir úr Sýria.

Í fyrilestrinum hjá Bente Dalsbæk, sum ber heitið »Med Underkop«, greiðir hon kjerliga og erliga frá lívinum hjá innflytarakvinnum. Eitt evni, sum vanliga er afturlatið fyri umheiminum. Eisini hugleiðir hon um tætta sambandið millum hana og vermóðrina.

- Vónandi verður eisini høvi til eitt gott orðaskifti um leiklutin hjá kvinnum, javnstøðu, um at standa við trúgv sína og samstundis geva pláss fyri øðrum, sigur Bente Dalsbæk, sum er 40 ár, útbúgvin løgfrøðingur og fyrr hevur starvast í Fólkatinginum í 10 ár.




*Nýggi minibussurin hjá Sosialinum, Snoddi, sum eftir ætlan skal brúkast til reportaguferðir hjá blaðnum runt í Føroyum, koyrdi Naser Khader og familjuna til Kirkjubøar í morgun*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Naser Khader vitjaði Roykstovuna í Kirkjubø fyrrapartin*

*Mynd: Jens Kristian Vang*